SVENSKA VALIÐ

# FÓLKAHEIMIÐ Í FRÍUM FALLI

Í **SVØRÍKI** HALDA TEY **ONDINI** Í SPENNINGI, NÚ VAL VERÐUR **SUNNUDAGIN**. MEST SANNLÍKT VERÐUR TALAN UM EIN **SØGULIGAN** BORGARLIGAN SIGUR. DULDA **RASISMAN** KANN EISINI FÁA **FASTATØKUR** Í POLITISKA RETORIKKIN, OG SO ER EIN LÍTIL MØGULEIKI FYRI, AT **LANDIÐ** FÆR SÍN FYRSTA KVINNULIGA **FORSÆTISRÁÐHARRA**



**Rigmor Dam**
rigmor@sosialurin.fo

Valið í Svøríki hesaferð er á mangan hátt øðrvísi og spennandi.

Blái borgarligi vongurin við Fredrik Reinfeldt, forsætisráðharra, á odda, stendur til at vinna sítt næsta væl á rað. Hetta er ein støða, sum sosialdemokratiska "Fólkaheimið" ongantíð hevur verið í áður: At borgarligu flokkarnir stjórna landinum tvey valskeið á rað.

Um hin reyð/grøni blokkurin hinvegin vinnur, fær Svøríki, við Monu Sahlin og Socialdemokratiet, sín fyrsta kvinnuliga forsætisráharra.

## Missa svøvnin

Men tað, sum politikarar, miðlar og eygleiðarar missa svøvnin av, er vandin fyri, at høgraekstremistiski flokkurin Sverigedemokratarne skal fáa umboðan í Ríkisdegnum. Seinasta veljarakanning vísir, at flokkurin kann fáa heilt upp í sjey prosent av atkvøðunum. So, hóast allir hinir helst vildu givið honum durafjórðingin, bendir alt á, at flokkurin fyri fyrstu ferð røkkur upp um tinggáttuna og fær umboðan í Ríkisdegnum.

## Til reiðar at kvetta

Hetta kann so aftur elva til sannan ruðuleika á politiska leikvøllinum, tí ongin sigur seg vilja samstarva við flokkin við tí nazistisku jørðildinum, sum hann av øllum alvi roynir at renna undan. Men, sum tað sær út, kann hann lættliga gerast tungan á vágskálini, tá samgonga skal skipast.

Tí kann endin gerast, at søguliga skottið millum teir báðar blokkarnar verður tept. Bláa borgarliga samgongan og reyð/grøna alternativið noyðast kanska brádliga at samstarva tvørtur um miðjuna – eitt sum fyri fáum árum síðani var óhugsandi í Svøríki, har Javnaðarflokkurin so at siga hevur sitið við avgjørdum meiriluta meginpartin av nýggjaru søgu landsins.

Talsfólkini frá Miljøpartiet hava longu boðað frá, at tey, í ringasta føri, eru til reiðar at kvetta alliansuna við reyð/grøna vongin, um tað kann forða Sverigedemokratunum at sleppa at valdinum. Eitt tilboð sum Fredrik Reinfeldt, verandi og helst eisini komandi stjórnarleiðari, ikki vísir frá sær, tí hann vil so avgjørt heldur ikki enda í somu støðu sum ræðumyndin Danmark, har Danski Fólkaflokkurin er vorðin stovureinur og virkin viðspælari á borgarliga vonginum.

## Útifryst úr kjakinum

Men, hóast vit her í grannalondunum hava hoyrt mest um rokið við Sverigedemokratarna, hevur kjakið í Svøríki upp til valið eisini snúð seg um annað. Og svium líkt, hava miðlar og politikarar í stillum verið samdir um at ignorera flokkin og ræðuherferð hansara móti innflytarum.

So har eru mong onnur mál, sum vanligi sviin er nógv meiri upptikin av í valstríðnum, so sum arbeiðsmarknað, heilsu, ognarskatt og skúlamál. Eisini hevur nógv kjak verið um verjupolitikk og eina nýggja svenska eftirlitslóg.

Óansæð hvat valið endar við, hevur svenska valstríðið hesaferð verið óvanliga spennandi, og ongantíð hevur útlandið fylgt so væl við sum hesaferð. Serliga í Danmark, har danir eru botnfornermaðir inn á sviar, tí teir brúka Danmark og Danska Fólkaflokkin sum ræðumynd.

## FAKTA

- Ríkisdagsvalið verður 19. september
- Svenska tingið eitur Ríkisdagurin. Tað hevur eitt kamar og 349 limir
- Forsætisráðharri síðan oktober 2006 hevur verið Fredrik Reindeldt, formaður í Moderaterna
- Socialdemokraterna hava rátt í svenskum politikki síðan 2. heimsbardaga. Men á valinum í 2006 mistu teir valdið til borgarligu Moderaterna, sum kastaðu saman við Centerpartiet, Kristendemokraterne og Folkepartiet
- Ein møgulig reyð/grøn stjórn verður mannað av Socialdemokraterna, Miljøpartiet og Venstrepartiet
- Fremmandafíggindaligi flokkurin Sverigedemokraterne kom ikki í Ríkisdagin á valinum í 2006
- Seinastu veljarakanningar vísa, at Sverigedemokraterne liggja um sjey prosent og koma inn. Centerpartiet og Kristendemokraterne rúka helst út.

## Peninganýtsla

Roknað verður við, at flokkarnir brúka tilsamans 250 milliónir krónur til valstríðið. Yvirlitið vísur, hvussu nógv verður brúkt í ár og í klombrum upphæddin frá valinum 2006

| | |
|---|---|
| Socialdemokraterna: | 70 mió. *(50)* |
| Centerpartiet: | 65 mió. *(50)* |
| Moderaterna: | 50 mió. *(37)* |
| Folkpartiet: | 30 mió. *(30)* |
| Kristdemokraterna: | 17 mió. *(12)* |
| Miljöpartiet: | 10 mió. *(10)* |
| Vänsterpartiet: | 7 mió. *(7)* |
| Sverigedemokraterna: | 19 mió. |
| Bláí vongurin: | 162 milliónir *(129)* |
| Reyð/grøni vongurin: | 87 milliónir *(67)* |

## Herrópini

| | |
|---|---|
| Socialdemokraterna: | **vVi kan inte vänta** |
| Centerpartiet: | **Ge drömmen en chans** |
| Moderaterna: | **Sverige har bara ett arbetarparti** |
| Folkpartiet: | **Framtiden börjar i klassrummet** |
| Kristdemokraterna: | **Ett mänskligare Sverige** |
| Miljöpartiet: | **Modernisera Sverige** |
| Vänsterpartiet: | **Håll ihop** |
| Sverigedemokraterna: | **Trygghet & Tradition** |